Álit

í

løgtingsmáli nr. 46/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Fylgibroyting orsakað av broytingum í almannalóggávuni o.a.)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 4. november 2020 og eftir 1. viðgerð 17. november 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 24. november 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Nevndin vísir á, at uppskotið leggur upp til tvær broytingar.

Tann fyrra broytingin ber í sær, at tær veitingar í forsorgarlógini, sum í dag eru skattafríar, eisini verða skattafríar eftir ársskiftið, hóast heimildin fyri at lata veitingarnar verður flutt úr forsorgarlógini í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

Tann seinna broytingin ber í sær, at tann venja, sum er í dag, ikki at skatta ávís gjøld til barnið eftir kunngerð um samsýning til fosturforeldur, verður lógarfest.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 30. november 2020

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Kristina Háfoss
	Ruth Vang	